# Nicklas skal kappast ímóti Ragnari

Hin finalisturin úr næstu semifinaluni er Nicklas the Nerd, sum hann kallar seg. Hann hevur vunnið eina rúgvu av kappingum innan dansin Hip Hop. Í dag er Nicklas 17 ára gamal, og hevur dansað síðan hann var átta, og fyri kortum gjørdist hann heimsmeistari innan Hip Hop. Mest kenda søgan um Nicklas er tó, at hann fyri nøkrum árum síðani misti mammu sína. Hon doyði av krabbameini. Tá Nicklas trein á pallin í undanumfarinum í Keypmannahavn, helt Julie Steincke, at hon hevði funnið vinnaran av allari kappingini, so lítil ivi er um, at Nicklas er ein av favorittunum í Talent 2008.



# Góðir tónleikarar

Undir framførsluni hjá Ragnari í semifinaluni í Talent 2008, hevði Ragnar tveir tónleikarar afturat sær. Talan er um Fríða Øster, ið leikti á trummu, og er sonur tann navnframa Ólav Øster. Hin eitur Martin Hald. Ragnar og øll rundanum vóru sera væl nøgd við samstarvið, tí tónleikararnir vóru sera dugnaligir, og tað skuldi ikki undrað, um teir vóru bidnir at leika saman við Ragnari eina aðru ferð eisini.

# Kanska eg syngi á føroyskum



*Enn hevur ungi punkarin ikki avgjørt, hvat hann skal spæla í finaluni, men tað verður í hvussu so er okkurt punkkent*

## Ragnar í finaluni

TALENTKAPPING
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

- Guðrun Sólja vann, Vígdis vann og Jógvan Hansen vann eisini, og eg havi onki ímóti at vera sammettur við tey, segði Ragnar Finsson við Sosialin, áðrenn hann var við í undanumfarinum í Hjørring í Talent 2008, tann. 5. septembur.

Fríggjadagin sannførdi hann hyggjararnar so mikið nógv, at hann at enda stóð millum trý tey bestu. Síðani gjørdist greitt, at dansarin, Nicklas, var fremstur av øllum, og tað vildi siga, at dómararnir skuldu avgera, hvørt Ragnar ella strúkaratrioin – Kaya, Igor og Anna – skuldi víðari úr semifinaluni. Endin var, at Ragnar fekk tvær atkvøður, og strúkararnir eina.

Tað hevur so við sær, at Ragnar Finnson verður at síggja, saman við átta øðrum, í stóru finaluni, ið verður um lítlar tríggjar vikur.

Spennandi verður sjálvandi at síggja, um Ragnar megnar at fylgja fótasporunum hjá Guðruni Sólju, Jógvani og Vígdis, og harvið vinna talentkappingina.

Sjálv finalan verður at síggja á DR1, fríggjadagin 24. oktobur klokkan 19.00 á DR1 og í sjónvarpinum hjá Kringvarpinum eitt korter seinni.

**Ragnar Finnson hevur enn ikki valt sang til finaluna, og er sum heild sera loyndarfullur. Men hann vil ikki útiloka nakað. – Kanska eg syngi á føroyskum, kanska ein sang hjá mammu ella babba, eg veit ikki, flennir Ragnar Finnson**

TALENTKAPPING
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*Ragnar Finnson skal bara einaferð afturat á skermin í Talent 2008, men nú er eisini talan um finaluna*

Sum tey flestu skiltu tað, lovaði Ragnar Finnson, at hann fer at spæla sítt egna tilfar, næstu ferð hann trínur á pall í Talent 2008. Spurningurin varð settur, aftaná tað var greitt, at Ragnar sleppur í finaluna.

- Tað var Martin, sum lovaði tað, eg lovaði tað ikki, sigur Ragnar avgjørdur, men leggur afturat, at tað als ikki liggur uttanfyri hansara hugsan at spæla okkurt heilt øðrvísi enn í semifinaluni.

- Tað verður heilt sikkurt okkurt nokk so punkut, men eg havi enn góða tíð at avgera, hvat eg vil spæla, men kanska eg syngi á føroyskum, kanska ein sang hjá mammu ella babba, eg veit ikki, flennir Ragnar Finnson. Spurdur hvussu nógv foreldrini avgera er havnadrongurin rættiliga avgjørdur.

- Tey bestemma ikki ein biiib um, hvat eg velji at spæla, men tey hjálpa mær eitt sindur, sigur Ragnar. Víðari greiðir Ragnar frá, at rætti sangurin nokk skal koma til hansara, og at hann nokk skal leggja merki til sangin tá hann kemur.

### Minnist ikki alt

Í semifinaluni spældi Ragnar Finnson lagið 99 red baloons, ið var frammi í 80'unum, men Ragnar framførdi lagið í einari punkkendari útseting.

- Eg valdi tað lagið, tí eg helt tað rigga ordiliga væl. Eg havi eisini spælt tað nógv, og mær hevur altíð dámt lagið. Eg helt eisini, at tað rakk út til tey flestu, tí tað er eitt so kent lag. Men eg minnist næstan ikki, at eg spældi tað. Eg minnist bara at tað var mega, mega, mega feitt at vera á pallinum, sigur ungi havnardrongurin.

Men hann minnist nøkulunda, hvat dómararnir søgdu.

- Tað eg minnist best, var at Peter mussaði hondina hjá mær, sjálvt um hann ikki vildi hava meg víðari, at Julie var ordiliga positiv og so var okkurt við, at Martin vildi hava meg meira orginalan, flennir ungi punkarin.

### Leyp fram á gólvið

Tað gjørdist øgiliga spennandi til endans. Ragnar og strúkaratrioin vóru møguligu finalistarnir. Tað var helst ov mikið fyri tey flestu, men tá Martin Hall valdi Ragnar, var alt avgjørt, og Ragnar leyp fram á gólvið.

- Mann ger bara tað fyrsta. Eg haldi ikki eg hugsaði, men eg var bara so mega glaður, og tað var mega kul, at hini tóku tað so pent, at tey ikki komu víðari, sigur Ragnar. Hinvegin tók hann ikki beinleiðis synd í stúkarunum, ið eisini vóru sannførandi.

- Tað er ein kapping, og Martin segði, at tey kanska ikki riggaðu inn í akkurát hesa sendingina, men tey duga ordiliga væl, greiðir Ragnar Finnson frá.

### Nicklas er ein favorittur

Nógv løgdu helst merki til, at Ragnar sýntist sera fegin, tá tað var greitt, at dansarin, Nicklas, var komin í finaluna.

- Hann er ein av mínum favorittum at vinna kappingina, tí hann dugir ótrúliga væl. Eg kom eisini at kenna hann nokk so væl meðan vit vóru har. Kanska skuldi eg ikki sagt, hvat eg haldi um hini, men hann dugir ordiliga væl, fortelur Ragnar.

### Ein stemma til framtíðina

Um tríggjar vikur verður finalan, og tá verður spennandi at vita hvussu fer gangast Ragnari, og helst fara nógvir føroyingar at finna telefonina fram og atkvøða fyri unga havnadronginum.

- Nú má mann bara hopa og ynskja, men fólk mugu minnast til, at ein stemma uppá meg, er ein stemma uppá framtíðina, grínur Ragnar Finnson, sum vit heilt víst ikki hava hoyrt tað seinasta til.

## Ongin tilvild í Talent 2008

TALENTKAPPING
*Eirikur í Jákupsstov*
*eij@sosialurin.fo*

Sum tey flestu, ið hugdu at Talent 2008 fríggjakvøldið løgdu merki til, so var ongin tilvild á skránni. Framførslurnar vóru allar royndar fleiri ferðir, men áðrenn endaligu framførsluna var fór ein heilur dagur fram handan leiktjaldið.

- Gjøgnum dagin vóru vit mest backstage. Tað var mega gott, og vit ordiliga hugnaðu okkum, vit vóru øll í somu skom, so øll vistu líkasum hvat hini hugsaðu. Har var bara onki kalt vatn. Men vit royndi líkasum at fáa okkurt annað, enn júst framførsluna at hugsa um, sigur punkarin, ið hevur vunnið hjartað á mongum føroyingi.

Dómararnir sóu tó framførslurnar fyrstu ferð, tá sendingin var.

- Tað hevði verið ringt at spælt yvirraskaður fleiri ferðir, men tað gjørdi tað nógv lættari at koma á pallin, at vit sluppu at royna fleiri ferðir. Vit fingu eisini peptalk áðrenn vit fóru á pallin, og tað gjørdi góðan mun, fortelur Ragnar Finnson.